# Missiónslega umborð á Norrönu

**71 føroyingar hava verið ein túr í Noregi við Heimamissiónini. Talan var um eina legu, sum varð hildin umborð á Norrønu og á norska bíbliuskúlanum Bildøy**

UNGDÓMUR

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*
*Myndir: Jógvan Joensen*



*Her eru nakrir av luttakarunum í miðbýnum í Bergen*

Síðsta vikuskifti skipaði Heimamissiónin fyri einari “18 ár og eldri” legu umborð á Norrønu. 71 fólk luttøku á leguni. Flestu vóru 18-25 ár, men summir luttakarar vóru eisini meira tilkomnir.

Luttakararnir vóru úr nógvum ymiskum samkomum, men tey flestu hava tilknýti til Heimamissiónina, sum skipaði fyri túrinum.

Legan byrjaði hósdagin 1. mars, tá ið luttakararnir hittust á farstøðini. Seinni sama kvøldið var samansjóing umborð á Norrønu.

Summi løgdust beinanvegin við sjóverki, men tey flestu vóru tó ”fit for fight”.

Dagin eftir var nógv undirvísing á skránni. Evnið á leguni var ”missión”, og Heri Kjærbo hevði bíbliutímarnar umborð á Norrønu.

Heri hevur sjálvur virkað sum trúboðari í Tansania saman við konuni Malan. Tey vendu heim aftur í fjør, og síðani hevur Heri talað nógv á klettunum um missión.

- Missión er mítt hjartamál, segði Heri Kjærbo á fyrsta bíbliutímanum.

Luttakararnir arbeiddu í bólkum og skuldu eisini taka virknan lut í bíbliutímunum.

### Búðu á bíbliuskúla

Norrøna legði at í Bergen, har í føroyingarnar fóru í land. Teir skuldu gista í tvær nætur á bíbliuskúlanum Bildøy, sum hoyrir til Indremisjon í Norra.

Fleiri føroyingar hava gingið á hesum bíbliuskúlanum, og summir fyrrverandi næmingar vóru eisini við á hesum túrinum. Teir fingu so høvi at hitta nakrar av lærarunum aftur.

Annfinn Norheim, rektari á Bildøy, hevði tveir bíbliutímar við føroyingunum, og eftir hetta høvdu tey frí restina av kvøldinum.

Leygardagin var frídagur. Har nýttu fleiri høvið at fara ein túr inn í Bergen at ”shoppa”. Summir (mestsum einans mannfólk, blaðm.) fóru á pubb at hyggja at stórdystinum millum Manchester United og Liverpool.

Onnur royndu at standa á skí, meðan onnur fóru at svimja.

### Ungdómsmøti í Bergen

Leygarkvøldið fóru allir føroyingarnir á ungdómsmøti í missiónshúsinum Betlehem í Bergen.

Ungdómstrúboðarin í Betlehem talaði um lovsang. Annars var møtið sera meinlíkt einum vanligum ungdómsmøti hjá Heimamissiónini í Føroyum.

Sunnumorgun var leiðin løgd heim aftur. Har hevði Heri Kjærbo aftur tveir bíbliutímar. Sunnukvøldið var opið sangmøti umborð á Norrønu. Har møttu heilt fitt av fólki.

Fyriskipararnir eru væl nøgdir við túrin, og tað tókst sum, at luttakararnir hugnaðu sær.



*Tað var Heri Kjærbo, sum fyrr hevur verið trúboðari í Tansania, ið talaði í sambandi við bíbliutímarnar umborð á Norrønu*



*Annfinn Norðheim, rektari á bíbliuskúlanum í Bildøy, hevði tveir bíbliutímar fyri føroyingunum*